LM-099/2020

Fylgiskjal 10.

UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

FISKIMÁLARÁÐIÐ
Postbox 347
YVIRI VIÐ STROND 15
110 TÓRSHAVN
FØROYAR

Tórshavn, 14. januar 2021
J.nr.: 20/02889-2
Tykkara skriv: 19/00047

att.: Andras Marr Poulsen

Viðmerkingar til uppskot til broytingar í tilbúgvingarlógini

Viðmerkingar til broyting 2
§ 2 í løgtingslóg um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur, er soljóðandi:

§ 2. Sjálvbodnar kommunusamanleggingar ella kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur kunnu verða framdar/framd innan hesar eindir:

1) *Norðoyggjar t.e. Fugloyar, Svínoyar, Viðareiðis, Hvannasunds, Klaksvíkar, Kunoyar, og Húsa kommunur.*
2) *Eysturoy, t.e. Fuglafjarðar, Leirvíkar, Gøtu, Nes, Runavíkar, Sjóvar og Funnings kommunur.*
3) *Sundalagið, t.e. Eiðis og Sunda kommunur.*
4) *Streymoy, t.e. Tórshavnar kommuna.*
5) *Vágar, t.e. Sandavágs, Miðvágs og Sørvágs kommunur.*
6) *Sandoy, t.e. Skopunar, Sands, Skálavíkar, Húsavíkar og Skúvoyar kommunur.*
7) *Suðuroy, t.e. Hvalbiar, Tvøroyrar, Fámjins, Hovs, Porkeris, Vágs og Sumbiar kommunur*

Stk. 2. Vestmanna og Kvívíkar kommunur hava saman valfrælsi, hvørt tær saman skulu verða partur av eindini 3, 4 ella 5. Hava Vestmanna og Kvívíkar kommunur ikki tikið avgerð innan 1. oktober 2009, tekur landsstýrismaðurin avgerð.

§ 4 í løgtingslóg um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m. er soljóðandi:

§ 4. Kommunurnar skulu áðrenn 1. mai 2014 hava skipað seg í kommunal samstarvsøki, ið hava til endamáls at umsita heimatænastu, eldrarøkt v.m. í avvarðandi kommunum.
Stk. 2. Kommunalu samstørvini skulu í mestan mun skipast samsvarandi hesum økjum:

1) *Suðurstreymoy (Tórshavnar kommuna), sbr. stk. 3.*
2) *Vágar/Norðstreymoy (Vága, Sørvágs, Vestmanna, Kvívíkar, Sunda og Eiðis kommunur).*
3) *Eysturoy (undantikið Sunda og Eiðis kommunur).*
4) *Norðoyggjar.*
5) *Suðuroy.*
6) *Sandoy.*

GONGIN 7 • P.O. BOX 377 • FO-110 TÓRSHAVN • FAROE ISLANDS
TELEPHONE + 298 30 66 00 • E-MAIL: UVMR@UVMR.FO • Homepage: www.uvmr.fo

Stk. 3. Tórshavnar kommuna fær heimatænastu, eldrarøkt v.m. at umsita sum sjálvstøðugt øki/kommuna.
Stk. 4. Kommunal samstarvsøki, ið ikki eru samsvarandi økjunum í stk. 2, skulu taka fyrilit fyri, at økini eru landafrøðiliga og samferðsluliga samfeld.
Stk. 5. Kommunal samstarvsøki, ið ikki eru samsvarandi økjunum í stk. 2, skulu hava í minsta lagi 3000 íbúgvar.
Eindirnar í lógaruppskotinum til § 12 a um skipan í landafrøðiliga samfeld kommunal tilbúgvingarøki eru ikki í samsvari við omanfyri nevndu ásetingar, hvørki í mun til skipan av tilbúgvingarøkjum í landafrøðiliga og samferðsluliga samfeld øki ella í mun til kravt fólkatal. Uppskotið líkist § 4 í seinna nevnda dømi omanfyri, tó er fólkatalið í stk. 4 í uppskotinum 4000, meðan tað fyri samstørv á eldraøkinum í § 4, stk. 5 er 3000 og í lógini um sjálvbodnar kommunusamanleggingar skal fólkatalið í samstarvsøkinum helst vera í minsta lagi 2000, sbrt. § 3, stk. 1.

Hóast tað í viðmerkingunum er nevnt, at ynskiligt hevði verið at skipað kommunalu tilbúgvingina í trý tilbúgvingarøki samsvarandi økisbýtinum hjá løgregluni og heilsutilbúgvingini, verður skotið upp at skipa nýggju tilbúgvingarøki. Verða økini samanborin við omanfyri nevndu lógir, verður Vestmanna og Kvívíkar kommunur skipaðar sum sjálvstøðugt tilbúgvingarøki og Eysturoy verður býtt í tvey.

Eisini skulu avtalur um kommunal samstørv sambært lógini góðkennast av landsstýrismanninum í kommunumálum.

Uppskotið til broytingar í § 12 a í tilbúgvingarlógini eru sostatt ikki í samsvari við longu galdandi serlóg, sum regulerar samfeld landafrøðilig og samferðslulig øki at skipa kommunalar eindir og kommunal samstørv. Tað er óheppið ikki at nýta samanfallandi økisuppbýti fyri lógarbundin kommunal samstørv.

Verður tað mett skilabetri at skipa færri tilbúgvingarøki enn tey, sum eru allýst í lógini um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv, so má ein heimild fáast til vega, sum loyvir júst hesum og tað skal vera greitt hvør góðkennandi myndugleikin tá skal verða, altso um tað skal vera landsstýrismaðurin í tilbúgvingarmálum ella landsstýrismaðurin í kommunumálum. Sum nevnt umrøður uppskotið jú møguleikan fyri einaferð at skipa landið í trý tilbúgvingarøki.

Hóast § 12a, § 12b og § 12c vísa til heimildina í § 8, stk. 2, sum ásetur at avtalurnar, og eisini broytingar, skulu góðkennast sambært § 51 í kommunustýrislógini, er ásett í uppskotinum til § 12d, at góðkenningarmyndugleikin er landsstýrismaðurin í tilbúgvingarmálum. Tað er ógreitt, hvussu er við góðkenning sambært § 51 í kommunustýrislógini í hesum førum.

Viðmerkingar til broyting 4
Í uppskotinum til § 14a, stk. 1, fær landsstýrismaðurin heimild at áleggja kommununum at seta á stovn ein fráboðanarsentral, meðan tað í viðmerkingunum stendur, at landsstýrismaðurin fær heimild at seta fráboðanarsentralin á stovn vegna kommunurnar. Her er ikki heilt samsvar. Skal talan vera um ein sentral, sum seinni skal samskipast við heilsuverk og politi, er rættast at talan verður um ein stovn/sentral hjá landinum. Um kommunurnar, sum ábyrgdarar fyri tilbúgving, skulu vera við til at fíggja ein tílíkan stovn, átti at verið landsstýrismanninum álagt at skipa

stovnin/sentralin í samráð við kommunurnar. Mælt verður frá at stovnseta ein interkommunalan stovn/skipan afturat.

Viðmerkingar til broyting 5
§ 15, stk. 3-5 umrøður kravið um egintilbúgving hjá fyritøkum. Sambært § 15, stk. 3, 1. pkt., er tað kommunan, sum ger váðameting av, um egintilbúgvingin hjá øðrum er nøktandi. Hetta brýtur við vanligu aðalregluna um, at fyritøkan sjálv skal meta um egnar váðar og hvør tilbúgving er hóskandi hjá fyritøkuni at hava. Fyritøkur kunnu eitt nú eisini ganga inn í eitt avtalugrundað samstarv um tilbúgving, um tað kann sigast at vera tilbúgvingarliga skynsamt og nøktandi.

Heldur eigur kommunan – við heimild í § 15, stk. 2 í lógini – at eftirspyrja og tryggja sær innlit í tilbúgvingarætlanirnar hjá fyritøkum í kommununi, so kommunan kann gera sær eitt yvirlit yvir tilbúgvingartørvin í kommununi.

Í § 15, stk. 3, 2. pkt. er eisini ásett, at landsstýrismaðurin kann áleggja eini fyritøku at hækka sítt tilbúgvingarstig sambært váðametingini hjá kommununi. Aftur her er tað kommunala váðametingin, sum er "dimensjonerandi" fyri tilbúgvingarstigið hjá fyritøkuni og ivasamt er, um tað er ein skilagóður máti at umsita egintilbúgvingina eftir. Sambært § 15, stk. 2 í lógini, hava bæði kommunala tilbúgvingin og landsstýrismaðurin innlit í tær egintilbúgvingar, sum fyritøkur eru álagdar at gera. Tað er í tí dialoginum, at komast má fram til, hvussu langt tilbúgvingarskyldan hjá fyritøkuni røkkur og nær felagskommunala tilbúgvingin skal vera forlongdur armur og traðka til. Hetta krevur óivað ítøkiliga viðgerð alt eftir, hvat slag og hvussu vandakent virksemi hjá tí einstøku fyritøkuni er o.s.fr.

Eisini er ein heimild ásett í § 15, stk. 4 at áleggja fyritøkuni útreiðslur, sum kommunan hevur av at uppstiga kommunalu tilbúgvingina *afturfyri* at fyritøkan sleppur frá at gera tað sjálv í síni egintilbúgving. Eisini slíkar støður mugu viðgerast ítøkiliga. Hinvegin er óskrivaða tilbúgvingarliga aðalreglan væl hon, at jú meiri vandakent ella hættisligt eitt virksemi er, tess størri eru krøvini til egintilbúgving og harvið eisini hægri útreiðslur til at halda eina dygga egintilbúgving. Tað hevur bæði fyrimunir og vansar at flyta hesa tilbúgvingarábyrgd og -uppgávu burtur frá fyritøkuni og yvir á kommunalu tilbúgvingina og hetta eigur tí bert at vera gjørt í undantaksførum og eftir at ein lýsing og greining er gjørd í hvørjum einstøkum føri. Eisini eigur almenningurin at fáa innlit í slíkar tilbúgvingaravtalur millum fyritøkur og kommunurnar.

Í **§ 15, stk. 5** fær landsstýrismaðurin heimild at "dimensjonera" kommunalu tilbúgvingina, sum er spjadd yvir fleiri kommunur í mun til egintilbúgving hjá einari ella fleiri fyritøkum. Óansæð um talan er um tunnilsmunnar, bunkring av skipum, oljutangar til ymisk endamál, upphøgging av skipum, stórar eldsbrunar og spreingingar ella annað, so tykist tað skilaleyst, at landsstýrismaðurin skal inn at áseta og býta tilbúgvingarligar uppgávur og ábyrgd, tá lógarbroytingin annars júst leggur upp til økt kommunalt tilbúgvingarsamstarv. Mælt verður tí heldur at leggja hesa strategisku uppgávu til kommunurnar sjálvar, tí tað er eitt upplagt samstarvsøki.

Hilmar Høgenni
deildarstjóri